






men eisini hjá teimum dreingjum, sum um sumrarnar leitaðu sær til Oyndarfjarðar at ríða summarið av sær í einum ævintýri, sum rakk úr Vatnsdali oman í Støðna.

Lestrarfjølin var kanska komin úr Sibiria, hevði siglt fram við Novaja Semlja og farin um Hvítahavið, fram við skergarðinum í Noregi og var endað sum sker í sjónum í Djúpunum og hevði nú í ár so mong ligið til terra í Gutta-neystinum og var vorðið eitt gott lunnaskip at floyta við í Krabbhyli.

Skúla Jákup las: Johs. Evang. 1, 1 – 14. I begyndelsen var ordet, og ordet var hos Gud, og ordet var Gud. Dette var i begyndelsen hos Gud. Alle ting var blevet til ved det.. Tú hoyrdi vættrarnar teska sína millum, at sjálvandi var lestrarlunnafjølin eisini vorðin til við einum orði. Garðshornsvætturin, sum var so belest, meinti, at lunnurin var farin oman eftir Jenisej sum eitt stórt træ, men varð sindrað sundur av tí stríða streyminum í ánni og tað, sum áin ikki kláraði, tað kláraði havið við sínum ævigu brotasjógvum at piða av bulinum restina av tí, ið Várharra hevði skapt við einum orði á einari víðari fløtu í Sibir.

Gulligi rekaviðurin lýsti hetta jólakvøld uppi undir tróðrinum í durinum hjá Fíu við Stein....... Skúla Jákup setti høkuna fram ímóti lestrarfjølini úr Sibir og las: Når vi nu igen bliver indbudt til at holde julefest, gælder det jo om at få en virkelig velsignelse ud deraf, så det ikke blot bliver en fest for kødet.... Fía og alt bygdarfólki sótu undir orðinum og lurtaðu við andakt eftir, hvat Skúla Jákup hevði at siga bygdarfólkinum. Lesturin bar heitið: Har du modtaget Guds julegave? Vættrarnar søgdu allar við ein munn: - Ja, sjálvandi hava vit tað. Vit eru manngóðar. Vit gera bara góðar gerðir... ja, vit gera bara góðar gerðir. Fía við Stein sat í sínum heilaga heimi og smánikkaði. Ella var hon sovnað? Nei, eingin kann sova jólakvøld í Oyndarfjarðar kirkju undir takskegginum við Stein. Tað ber ikki til. Knappliga leyp ein vættur niður á pannuna og sat nú á herðunum á Fíu og lýddi henni okkurt í oyrað. Hon lat eyguni renna eftir hesum fitta, forniska skapningi. Tað



sást tíðiliga, at tey kendust. Eingin ivi var um, at hetta var Steinavætturin, sum var so góður við Fíu, og hon við hann, at her var skinni ikki undan aðrari lon enn við Stein. Fía brosaði og vætturin brosaði. Øll í kirkjuni í durinum við Stein vendu sær á og brosaðu.. Øll sóu vætturin og hvussu Fía lýsti í sínum okkergula sjali, sum nú varð drivið í livandi ljósi undan penslinum hjá Rembrandt ella Eckersberg. Skúla Jákup hoyrdi væl hetta suðið, sum nú fór um alt skotið við Stein jólakvøld 1951. Hann kendi til lótirnar í bygdini, um vættralív, gamlamannalív, mandómslív, ungdómskæti, barnagaman og barnafjas.

Jákup lyfti høvdið upp og menti sína rødd í einum drynjandi lagi, legði áherðslu á orðini og á stavilsini, sum settu seg í ta ljósu høkuna, sum var eins ljós sum rekatræið. Brillurnar gjørdust so livandi at onkur vættur var bangin fyri, at tær fóru at detta av nøsini,. Gjørdu tær tað og brustu í gólvið og fóri í sor, so vóru jólini oyðiløgd. Eingin kundi lata jólakvøld í ein so heilagan dám við sínum ikoniska atburði, lata upp fyri ein dýrd úr lestrarbókini hjá Carl Moe , sum Skúla Jákup. Hann var í ljósinum í Oyndarfjarðar kirkju undir skotinum hjá Fíu við Stein.... Ordet blev kød, det vil sige, da Jesus, som fra evighed af var hos Gud og selv var Gud, og ved alle ting er skabt, forlod denne herlighed og steg til det fornedrede liv på en jord, hvis fyrste er djævelen... Skúlavætturin leyp niður á lestrarfjølina at sita til reiðar at lofta brillunum hjá Skúla Jákup, um tað skuldi borið á, at brillurnar fóru eina flogferð í tí tóma rúminum jólakvøld, so skuldi hann lofta teimum. Skúla Jákup vildi hava at øll, sum sótu undir Guds orði í kvøld, skuldu taka við orðinum, tí menti hann seg upp, nú tað líkasum fór sum eitt vættrasjóð um næstan øll húsini við Stein. Vætturin nærkaðist lestrarbókini. Jákup tók hondina upp frá lestrarfjølini og fór at kína vættrinum. Vætturin brosaði og tað gjørdi Jákup eisini. Hinar vættrarnar, ið hingu uppi undir takskegginum í durakovanum, brosaðu, og tær áttu eisini onkran, sum sat í dusraskotinum í Oyndarfjarðar kirkju við Stein hetta kvøldið. Tær smáflentu og peikaðu eftir sínum eigarafólkum. Har vóru vættrar undan Garðshorni, Marknagili, av Flótti, úr Skúla-num, av Grundlendi, Dunganum, úr Ansastovu, Heiðriksstovu, Móritsarstovu, Stovuni, Breytini, Stórustovu , Billustovu, av Gutta, Garðamørk, úr Víkum, Kinn, Hálvmørk, Tarti, Langagarði og undan Garði. Teimum vaksnu vístu vættrarnar seg ikki altíð fyri, men jólakvøld komu tær undan væðingunum og fóru beina leið oman og heim í Sjóvartún. Hetta var eitt av teimum fáu kvøldunum, tær samlaðust á árinum. Hetta var teirra kvøld, tí tær vóru so manngóðar, og jólaboðskapurin talaði til teirra smáu sálir, sum tær væl kundu kenna seg aftur í. Tær vístu seg fyri øllum kirkjufólkinum undir takskegginum í durinum við Stein hetta kvøldið.

Børnini brosaðu, tá ið tey sóu vættrarnar og tað vóru glómur í teimum, tá ið Skúla Jákup fór at kína sínari eygagóðu vættur á lestrarfjølini. Hetta var eitt satt ævintýr, sum ikki hevði sín líka kring tann víða heim.

Tá ið lesturin var liðugur undir durahválvinum við Stein, tók Skúla Jákup lestrarfjølina og skuldi seta hana á pláss, men tá bleiv slík trongd frammi í kór. Øll, sum inni vóru, vildu sleppa upp á hesa lunnalestrarfjøl. Flestu teirra kendu lunnin aftur, sum hevði havt nógvar góðar dagar í Krabbhyli. Skúla Jákup fekk einki gjørt. Hann stóð bara og hugdi at. Til endans varð rópt til hansara: - Kom við, Jákup, tað er eisini pláss fyri tær!- Hvar fara tit? – Vit fara yvir í kirkjuna. Tað er jólakvøld. Skúla Jákup setti seg á fjølina, men Fía við Stein vildi ikki. Hon vildi ganga sjálv, sum hon altíð hevði gjørt. Hon kom í sínum jólahýri einsamøll, sum hon var von um Sjóvartún.

Í nøkrum kastingum sigldi lunnurin undan durinum, fram við húsunum hjá Ellu á Breyt, Stórustovu og smiðjuni. Lunnurin fann vegin sjálvur og allar vættrarnar hildu í hesum kosmiska spreki, so hann stýrdi beina leið til kirkjuna. Komin í forkirkjuna skóru øll útí at syngja:

*Søde Jesus, Davids rod,*
*kæmpestærk og barnegod,*
*høvding stor i Englehjem,*
*barnefødt i Bethlehem,*
*du, som giver nytår bedst,*
*kom herind og vær vor gæst,*
*gør en liflig julefest!*

Tann okkerguli liturin, sum spældi sær allastaðni í viðinum, kastaði sítt glaruta ljós yvir andlit og hendur á teimum , sum sótu á lunninum, nú hann kom siglandi inn eftir gólvinum. Sjálvt í lunninum var hetta ljósið. hetta var tað æviga ljósið, sum var í orðinum, sum Skúla Jákup hevði lisið um. Fía kom í sínum ljósabrúna sjali smoykin inn um og setti seg í sín stól. Hon helt hetta var í so nógv avgjørt at fara inn eftir kirkjugólvinum á einum lunni, men vættrarnar søgdu við Fíu, at vættrajól vóru bara einaferð um árið, og so skóru tær út í at syngja.

*Nu ville vi os samle*
*i Jesus Kristi navn,*
*de unge med de gamle*
*skal løbe ham i favn.*
*Hann er vor julegave,*
*vor glæde, lyst og liv,*
*i ham vi og vil have*
*vor jule-tids-fordriv.*

Knappliga vaknaði eg úr einum søtum svøvni við ommusa lið. Brá mær á og hugdi yvir har, sum Fía sat. Hon sat sum ein skínandi gloria í sínum fedranna beinki, har hon sum heilt ung hevði hildið til og nú á ellini sat einsamøll. Høgtíðin var í andlitinum og sáliggjørdi hennara andans vitsku í barninum, sum borið var jálanátt í tí játtaða landinum.

Jákup kom út á kórsgáttina og las útgangsbønina. Biðisløgini fóru um bygdina, Stórá og Krabbhyl. Eftir kirkjugongdina smeyg eg mær oman í Krabbhyl at vita, um lunnurin, sum alt kirkjufólkið hevði sitið á, lá í Krabbhyli. Nei, har var eingin lunnur. Fór í somu ferð yvir at Guttaneystinum. Jú, har lá hann í einum okkergulum ljósi, sum bara sæst jólakvøld í tí myrka neystinum, væl reivaður jólakvøld 1951.